# Børnini skulu mennast til at velja

**- Vit skulu ansað væl eftir okkara lítla samfelag. Eg vil ikki uppliva, at míni børn koma í ta støðu, ikki at hætta sær at fara nakrastaðni, tí tey hava gingið í einum vánaligum skúla, sum ikki hevur ment tey, sum hann átti, sigur Annika Næs Johannesen, sum í 2002 flutti aftur til Tvøroyrar at búgva og virka sum tannlækni**



Sosialurin

## Samrøða



**Anna Mortensen**

- Tað var fantastiskt at flyta hiðani til Keypmannahavnar og byrja tannlæknalesturin. Og tá eg hevði fingið prógvið, og familjan var vorðin ein týðandi partur av lívinum, hevði eg ikki hug at vera verandi, sigur Annika Næs Johannesen, sum síðan flutti til Grønlands at arbeiða sum tannlækni, saman við manninum Dennis, og tvey ára gomlu dóttrini Katlu.

– Tað var næstan sum at koma aftur til Tvøroyriat lenda í Aasiaat, ein býur við 3000 íbúgvum á eini fjarskotnari oyggj. Har búðu vit í 3 ár, høvdu tað sera gott og friðarligt. Í Grønlandi er øll tannviðgerin ókeypis, so eg hevði onki við pengar at gera. Direktoratið ber kostnaðin, og klinikkin hevur eina upphædd at arbeiða við, eins og aðrir almennir stovnar. Har vanta veruliga tannlæknar. Bara 5 grønlendskir tannlæknar vóru í landinum, um tað mundi, av einum hópi uppá 30-35. Restin vóru norðurlendingar.

- Sosialu trupulleikarnir vóru stórir og sjónligir í hesum lítla býi. Eitt stórt heim fyri insestoffur virkaði sum friðskjól hjá børnum, hagar tey komu at tosa og bara vera, saman við pedagogum og øðrum sjálvbodnum vaksnum. Hetta ávirkaði meg nógv á tann hátt, at álitið, sum eg vanliga hevði á onnur menniskju, var líkasum ikki til. Eg bað t.d. ongantíð nakran vera barnagenta, so vit vaksnu kundu fara út saman. Men dagstovnarnir vóru sera góðir, nógv samskifti var millum foreldur og stovn.

- Tað vóru nógv børn, sum skuldu loftast í sosialu skipanini, tí teimum vantaði umsorgan á ein og annan hátt. Hetta var gjørt við at samanseta ein bólk av sosialráðgeva, pedagogi, lækna, tannlækna, løgreglu, lærara, ja, fólki, sum á ymiskan hátt høvdu kontakt við barnið í dagligdegnum. Tey tosaðu sínámillum um, hvussu tey hjálpast kundi, og eg hevði varhugan av, at skjótt varð borið at, tá trupulleikar vóru. Ein góð skipan, sum vit eisini kundu havt her heima.

- Fólk vóru fitt, men tú kom ikki so lætt inn á lívið hjá teimum. Tey høvdu brúk fyri mínari kompetensu, men ikki so nógv menniskjanum. Sjálvt næstu grannarnir vistu ongantíð, hvussu eg æt. Tjóðskaparkenslan í hesum partinum av landinum var stór, og nógv noktaðu at tosa annað enn grønlendskt, so viðgerðin fór fram við tulki. Hetta lætti ikki beinleiðis um samskifti, og tað sindri av grønlendskum eg fekk sagt aftaná 3 ár, kom eg ikki langt við. Betur gekk tó við at skilja! Men lukkutíð, so vísa grønlendarir nógv kenslur, bæði tá tey eru kedd og glað. Gjørdi eg okkurt býtt, so flentu tey í kíki, og tá tey vóru bangin, ja, so grótu tey. Onki við at krógva nakað, sigur Annika Næs Johanensen.

### Góða samrøðan

Júst álit og samrøðan millum okkum menniskju eru dygdir, sum hava stóran týdning fyri Anniku. Í 2002 flutti familjan, sum nú taldi fýra við eitt ára gamla Hugin, til Tvøroyri. Her hava menniskju sum heild álit á hvør øðrum, og børnini hava álit á teimum vaksnu, uttan at vit tó nýtast vera naiv, heldur Annika.

– Hví tað gjørdist Suðuroyggin aftur, er ein blandingur av mongum. Tvøroyri hevði verið uttan tannlækna í 2 ár, so her føldi eg, at eg gjørdi mun. Eg fekk eina góða avtalu við kommununa um, at tey fíggjaðu ístandgerð av gomlu tannlæknahølunum, meðan eg sjálv keypti inventar. Og so dámar mær væl, at alt

## Kvinnur í Suðuroy

Manglandi kjak her suðuri, um okkara støðu í samfelagnum, er orsøkin til hesa greinarøð, grundað á samrøður við seks kvinnur í Suðuroynni. Vit eru ikki von við at spíðska pennin og siga okkara hugsan alment. Og als ikki kvinnurnar. Men nógvar hava hugsanir og meiningar um, hvussu vit í framtíðini møguliga kunnu koma burturúr hesi støðuni við stagnatión og fráflyting. Kvinnurnar eg hitti eru: Súnhild Holm, Anna B Samuelsen, Annika Næs Johannesen, Agnes Mols Mortensen, Aggi Ásgeirsdóttir og Kirsten Strøm Bech. Hetta er triði partur.

**Anna Mortensen**